*Trygvi Guttesen, floksskrivari í Sambandsflokkinum fer frá:*

# Ónøgdur við gongdina í flokkinum

Dagny Joensen

Tað kemur óvart á nógv, at Trygvi Guttesen, sum hevur verið floksskrivari í Sambandsflokkinum síðan 1994 og limur í starvsnevndini frá fyrst í sjeytiárunum, leggur frá sær.

Trygvi Guttesen vil ikki gera viðmerkingarnar til málið í dag. Hann er ikki fegin um at gevast í starvinum, sum hann eldhugaður hevur gingið inn fyri. Tó skilst, at samstarvið við leiðsluna í flokkinum ikki hevur verið fyrimyndarlig, einamest tí at so lítið hendir á politiska vígvøllinum, har stórmál fyri Sambandsflokkin áttu at fingið størri innivist.



**Samstarvið eitt vónbrot**

Sum skilst er Trygvi Guttesen harmur um at samstarvið við Javnaðarflokkin ikki hevur bilnast so væl. Flokkurin væntaði sær nógv av samstarvinum, tá samgongan varð skipað.

Hildið verður, at alt ov nógv tíð og orka nýtt til smámál og brigsl, meðan einki stórvegis er gjørt fyri at loysa veruligu álvarsmálini.

Tað hevur ikki gjørt støðuna innanhýsis í Sambandsflokkinum léttari, at Javnaðarflokkurin í málinum um ríkisfelagsskapin vendir sær til Tjóðveldisflokkin, tá tað skuldi verið mest náttúrligt at samgongan samstarvaði um hetta mál.

Um tað er hetta, sum hevur fingið bikarið at flóta yvir hjá Trygva Guttesen, ber ikki til at fáa váttað.

**Aktivur floksskrivari**

Eilif Samuelsen, landsstýrismaður fyri Sambandsflokkin, er harmur um at Trygvi Guttesen fer frá. Hann hevur ikki tosað við floksskrivaran, síðan hesi tíðindi frættust.

Landsstýrismaðurin vil ikki gera viðmerkingar til málið, áðrenn hann hevur tosað við Trygva Guttesen.

- Tað er harmiligt, um Trygvi Guttesen ger álvara av at fara, tí vit hava havt vælvirknaði floksskrivstovu. Tað hevur gagnað flokkinum og valfeløgunum.

- Umframt tað hevur Trygvi Guttesen verið aktivur leiðari og hevur skrivað í bløðunum um politisk mál.

**Samskiftistrupulleikar**

*Hvat heldur tú er orsøkin til at samstarvið fær slíkar avleiðingar?*

- Tað hava verið samskiftistrupulleikar seinastu tíðina, og tað kann m.a. vera orsøkin. Sjálvur haldi eg tað koma av, at vit øll hava verið so ovbyrjað av arbeiði.

Landsstýrið hevur havt nógv at gera og tingfólkini somuleiðis. Alt várið hevur orkan verið nýtt til at fyrireika arbeiðið at leggja niðan í tingið, og við sparitiltøkum o.ø.

Tað hevur gingið út yvir flokkin, landsstýrið og samgonguna, sigur Eilif Samuelsen, sum ikki ivast í at stóra arbeiðsbyrðan er orsøkin til at samskiftið ikki hevur verið nóg gott.



# Tvøroyri bjóðar oljuvinnu vælkomnari

Jan Muller

Nú oljufeløgini eru farin at gera seismiskar kanningar á føroyskum øki eru fleiri seismikkskip komin inn á landgrunnin at arbeiða.

Eitt teirra er Geco My frá stóru seismikkfyritøkuni Geco Prakla, ið er partur av samtakinum Schlumberger.

Geco My ger kanningar fyri tey trý stóru oljufeløgini, Statoil, Mobil og Enterprise sunnan og eystan fyri Føroyar.

Í vikuni kom skipið inn á Trongisvágsfjørð og legði at bryggju á Tvøroyri.

Nógv fólk høvdu leitað sær omán á bryggjuna at heilsa skipinum og bjóða tí vælkomið. Hetta er fyrstu ferð, at eitt seismikkskip leggur at á Tvøroyri og vænta tvørafólk, at hetta neyvan heldur verður seinastu ferð.

Tað er nevniliga politikkurin hjá kommununi, at Drelnes og Tvøroyri annars skal vera framtíðar útgerðarhavn hjá oljuvinnuni.

Á Tvøroyri stóðu eykalutir klárir, sum skipið skal hava umborð og vóru eisini fyrstu magnetbondini frá seismisku kanningum avskipað um Havnina og Vágar.

Hetta er fyrsta seismiska tilfarið, sum verður avskipað, síðani einkarloyvið hjá Western gekk út á nýggjárinum. Talan er um fyrstu stóru seismikkkanningina, sum oljufeløg standa fyri.

-Hetta eru spennandi tíðir, tí vit skulu vísa teimum útlendsku feløgunum, ið arbeiða á føroyskum øki, um vit eru førir fyri at veita tær tænastur, sum tey hava brúk fyri, og eg haldi, at vit so avgjørt hava klárað upptøkuroyndina sigur Johan Mortensen, stjóri á Marr & Co., sum er umboðsmaður fyri Geco My.

Hann sigur, at tað hevur víst seg at bera væl til at fyriskipa viðurskiftini soleiðis, at alt riggar, sum tað eigur.

Í sambandi við at seismikkskip legði at á Tvøroyri fyri fyrstu ferð var Egil Olsen, góðskumetari á Fiskavirking umborð við einum "køki" av feskum fiski til manningina á Geco My.

Við skipinum er eisini ein føroyingur, sum skal vegleiða í sambandi við fiskivinnu- og umhvørvisspurningar.


KIRSTEN SIGGARD
sum Edith Piaf
Fríggjakvøldið 24. mai

Kirsten Siggard
syngur Edith Piaf
•
Rasmus luttekur
•
Driv spælir
til dans aftaná

Kostnaður fyri alt kvøldið
kr. 300,-

Atgongumerki skulu
verða heintað
í seinasta lagi hósd.
23. mai á middegi

Bíleggið borð
á tlf. 17500

Til matna verður
- Laksapostei við havtasku, salati og dippi
- Tornedos reivað í bacon, serverað á breyðcrouton við grønmeti og bearnaisesós
- Konjakkmarinerað pera við berum og rákremi

Altíð vælkomin á
Hotel Føroyar

HIN FØROYSKI
NORRØNI
EFTIRSKÚLIN
Pákærvej 3 - Hygum
7620 Lemvig
Tlf. 0 97 83 61 00
Fax 0 97 83 60 56

TAXA
koyring
í VÁGUM
33537 & 86537

PIZZARIA
og
SKÁIN